# FORMLIG KRØV Í SAMBAND VIÐ RÆTTINDI HJÁ SKRÁSETTA

Oktober 2020

1. útgáva

Dátueftirlitið

## Innihald

1. Fororð ..................................................2

2. Formlig krøv til dátuábyrgdarar í sambandi við rættindi hjá skrásetta ..................................................3

2.1. Hvør skal tryggja rættindi hjá skrásetta? ..................................................3

2.2. Hvussu skalt tú samskifta við skrásetta? (§ 21) ..................................................3

2.3. Viðgerðir, ið ikki krevja eyðmerking (§ 15, stk. 2) ..................................................4

2.4. Tíðarfreistir at svara umbønum, kæruvegleiðing o.a. (§ 21, stk. 3 og stk. 4) ..................................................5

2.5. Greitt ógrundaðar ella órímiligar umbønir frá teimum skrásettu ..................................................6

(§ 21, stk. 5) ..................................................6

2.6. At vera vísur í samleikanum hjá skrásetta (§ 22, stk. 2, 2. pkt.) ..................................................8

2.7. Hjálp tínum stovni ella fyritøku og tínum starvsfólkum við at gera mannagongdir, skabelónir o.a. ..................................................8

## 1. Fororð

Tá tú sum privat fyritøka, almennur myndugleiki ella líknandi viðger persónupplýsingar (t.d. innsavnar, skrásetur, goymir, víðarigevur ella strikar), skalt tú geva gætur, at teir persónar, sum tú viðger upplýsingar um (nevnd skrásett), hava fleiri rættindi í dátuverndarlógini. Hesi rættindi hevur tú, sum dátuábyrgdari, skyldu at halda.

Rættindi hjá skrásettu í dátuverndarlógini eru:

- Rættur til kunning (§§ 23-25)
- Innlitsrættur (§ 26)
- Rættur til rætting (§ 27)
- Rættur til striking (§ 28)
- Rættur til viðgerðaravmarking (§ 29)
- Fráboðanarskylda í samband við rætting ella striking av persónupplýsingum ella avmarking av viðgerð (§ 30)
- Rættur til dátuflutning (§ 31)
- Rættur til mótmæli (§§ 32-34)
- Rættur til ikki at vera fyri avgerð, sum einans er grundað á automatiska viðgerð, undir hesum profilering (§ 35)

Endamálið við rættindum hjá teimum skrásettu er m.a.:

1) at skapa gjøgnumskygni um, hvør viðger upplýsingar um tey skrásettu
2) at geva teimum skrásettu møguleika fyri at fáa innlit í hvørjar upplýsingar um tey verða viðgjørdar
3) at geva teimum skrásettu møguleika at krevja, at skeivar upplýsingar strikast, rættast o.s.fr.

Tað er týdningarmikið, at tú, sum dátuábyrgdari, tryggjar tær, at tú ert førur fyri at røkja tína skyldu sum dátuábyrgdari yvirfyri skrásetta. Hetta kann m.a. gerast við, at tú hevur greiðar mannagongdir fyri, hvussu títt felag handfer rættindi hjá teimum skrásettu, hvørjar tíðarfreistir eru galdandi o.s.fr.

Í hesi vegleiðing fært tú eina lýsing av formligu krøvunum o.s.fr., sum tú altíð skal geva gætur, undir hesum tíðarfreistir.

Dátueftirlitið ger eisini vegleiðingar um innihaldið í teimum einstøku rættindunum, umframt teimum undantøkum, ið galda. Vegleiðingarnar eru hesar:

- Rætturin til kunning
- Rætturin til innlit
- Rætturin til rætting, striking og viðgerðaravmarking
- Rætturin til mótmæli, dátuflutning og til ikki at vera fyri automatiskari viðgerð

Á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum eru tøk dømi (skabelónir) um, hvussu ein kunning sbrt. § 23 kann síggja út og hvussu eitt svar upp á umbøn um innlit, sbrt. § 26, kann síggja út.

## 2. Formlig krøv til dátuábyrgdarar í sambandi við rættindi hjá skrásetta

### 2.1. Hvør skal tryggja rættindi hjá skrásetta?

Tað er tú, sum dátuábyrgdari, ið hevur ábyrgdina av at tryggja, at rættindi hjá skrásetta verða fylgd, t.e. at skrásetti er kunnaður um og hevur møguleika at nýta síni rættindi.

Møguligir dátuviðgerar hava sostatt ikki ábyrgd av hesum. Tó er einki, sum forðar fyri, at tú avtalar við ein dátuviðgera, at hann skal uppfylla rættindini hjá teimum skrásettu tína vegna.

Tað kann eisini vera ein fortreyt fyri, at tú kanst uppfylla tína skyldu, at ein dátuviðgeri hjálpir tær. Tú kanst t.d. hava fyri neyðini, at dátuviðgerin hjálpir til, tá upplýsingar, sum eru hjá dátuviðgeranum, t.d. á servarum, skulu rættast ella strikast.

### 2.2. Hvussu skalt tú samskifta við skrásetta? (§ 21)

Tá tú samskiftir við skrásetta – óansæð um tað fer fram av tínum eintingum ella eftir umbøn – skal hetta fara fram skrivliga, uttan so, at tann skrásetti biður um eitt munnligt svar.

Um tann skrásetti hevur sent eina umbøn elektroniskt, t.d. við telduposti ella við Mínboks, skalt tú so vítt møguligt svara skrásetta elektroniskt, um tann skrásetti ikki biður um annað.

Harafturat skal tú syrgja fyri, at tíni boð til tey skrásettu er stuttorðað, lætt atkomilig og løtt at skilja. Tú skalt á sama hátt nýta eitt greitt og einfalt mál, serliga um upplýsingarnar serstakliga eru rættaðar børnum.

## 2.3. Viðgerðir, ið ikki krevja eyðmerking (§ 15, stk. 2)

Sum dátuábyrgdari kanst tú ofta viðgera upplýsingar um likamligar persónar, uttan at tú veitst, hvørjir teir eru. Um tú t.d. fært ein teldupost frá slaettaratindur1994@felag.fo, er ikki beinleiðis gjørligt at eyðmerkja sendaran. Sendarin kann tó eyðmerkjast, tí tú kanst seta teg í samband við viðkomandi og biðja um fleiri samleikaupplýsingar.

Um tú viðger persónupplýsingar til endamál, ið *ikki krevja* ella ikki *longur* krevja, at tú veit, hvør skrásetti er, men har viðkomandi framvegis kann eyðmerkjast, hevur tú ikki skyldu til at savna fleiri upplýsingar um viðkomandi einans við tí endamáli at uppfylla rættindi hjá skrásetta.

Hetta merkir, at um tú fært ein teldupost frá slaettaratindur1994@felag.fo hevur tú ikki skyldu at skriva til viðkomandi og biðja um navn og telefonnummar, um endamálið einans er, at tú skal vera førur fyri at svara eini umbøn um innlit.

Hendan regla tekur støði í, at tú sum dátuábyrgdari bert skal viðgera tær upplýsingar, sum eru neyðugar til tey endamál, sum upplýsingarnar verða viðgjørdar til.

Um tú, sum dátuábyrgdari, ikki kanst eyðmerkja tann skrásetta, skalt tú, um tað er gjørligt, kunna skrásetta um hetta. Hetta kann t.d. vera, um tú bara viðger teldupostadressuna hjá skrásetta.

Um tú ikki kanst eyðmerkja skrásetta, skalt tú ikki halda reglurnar um rættindini hjá skrásetta um innlit, rætting, striking, avmarking av viðgerð, fráboðan til triðja persón, mótmæli og dátuflutning. Tú hevur tó framvegis skyldu til at lúka kunningarskylduna.

Um tann skrásetti vil útinna síni rættindi og í tí sambandinum gevur tær upplýsingar, sum hava við sær, tú kanst eyðmerkja viðkomandi, kanst tú ikki nokta at svara umbønini, uttan so, at tú kanst vísa á, at tú framvegis ikki ert førur fyri at eyðmerkja viðkomandi.

## 2.4. Tíðarfreistir at svara umbønum, kæruvegleiðing o.a. (§ 21, stk. 3 og stk. 4)

Tú skalt svara eini umbøn frá skrásetta um innlit, rætting, striking o.s.fr. *uttan óneyðugt drál og í seinasta lagi 4 vikur eftir*, at umbønin er móttikin. Tú skalt tá kunna skrásetta um øll tiltøk, sum eru sett í verk í sambandi við umbønina.

Um serstøk viðurskifti so sum nøgdin av umbønum ella torgreidni í teimum gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Tú skal tá í einum fyribilssvari innan 4 vikur eftir, at umbønin er móttikin, greiða frá orsøkini til seinkanina, og nær roknast kann við endaligum svari. Hetta merkir, at tað er ein avgjørd freist at svara umbønum frá skrásettum upp á tríggjar mánaðar. Meginparturin av umbønum er tó ikki torgreiddur, og umbønir skulu tí oftast svarast í seinasta lagi ein mánað eftir móttøku.

Noktar tú at viðgera eina umbøn, skalt tú kunna skrásetta um hetta alt fyri eitt og í seinasta lagi ein mánað eftir, at tú hevur fingið umbønina. Í teimum førum, har tú noktar at viðgera eina umbøn, skalt tú grundgeva fyri hesum og vegleiða um, at viðkomandi kann kæra til Dátueftirlitið.

Tað kann koma fyri, at tú noktar at viðgera eina umbøn, tí at tú ikki viðger upplýsingar um skrásetta, ella tí, at tú ikki ert samdur í, at striking ella líknandi skal fara fram.

Ert tú ein almennur myndugleiki skal tín grundgeving og tín kæruvegleiðing eisini lúka krøvini í fyrisitingarlógini[1] um ávikavist grundgeving og kæruvegleiðing.

## 2.5. Greitt ógrundaðar ella órímiligar umbønir frá teimum skrásettu (§ 21, stk. 5)

Er umbøn frá skrásetta *greitt ógrundað ella órímilig*, kanst tú annaðhvørt krevja eitt hóskandi gjald ella nokta at eftirlíka umbønini, serliga um hon verður endurtikin. Tað er tú, sum dátuábyrgdari, sum ber próvbyrðuna fyri, at umbønin er greitt ógrundað ella órímilig. Burtursæð frá hesum serligu støðum kanst tú *ikki* nokta eini umbøn ella krevja eitt gjald fyri at svara eini umbøn frá skrásetta.

**Dømi 1 – Greitt ógrundað umbøn**
Ein borgari B klagar til eina kommunu K um, at almannafyrisitingin í kommununi viðger skeivar upplýsingar um seg, og tí vil B hava upplýsingarnar rættaðar.

K setur seg í samband við B fyri at fáa nágreinað, hvørjar upplýsingar, sum B meinar, eru skeivar í hansara málum hjá almannafyrisitingini.

B vil hinvegin ikki – sjálvt eftir fleiri umbønum frá kommununi – nágreina, hvørjar upplýsingar eru skeivar.

*Kommunan hevur rætt til at nokta at eftirlíka borgarans umbøn um rætting, tí umbønin má metast at vera greitt ógrundað, tá borgarin ikki vil nágreina, hvørjar upplýsingar eru skeivar.*

[1] Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

**Dømi 2 – Órímilig umbøn**

Ein fyrrverandi kundi X hjá einum telefonfelagi Y biður um innlit í, hvørjar upplýsingar telefonfelagið viðger um viðkomandi.

Eftir, at telefonfelagið Y hevur svarað umbønini um innlit, biður X stutt aftaná umaftur um innlit í somu upplýsingar hjá Y.

Beint eftir, at telefonfelagið Y aftur hevur svar umbøn kundans um innlit, biður X fyri triðju ferð um innlit í somu upplýsingar.

*Telefonfelagið kann nokta umbøn kundans um innlit ella krevja eitt hóskandi gjald fyri svar. Hetta tí, at kundans umbønir um innlit eru órímiligar, tá kundin við stuttum millumbilum biður um innlit í somu upplýsingar aftur og aftur.*

Tað er annars týdningarmikið, at tú ansar eftir, at tað er tú – sum dátuábyrgdari – sum hevur próvbyrðuna fyri, at ein umbøn frá skrásetta er greitt ógrundað ella órímilig. Tí skalt tú, áðrenn tú noktar at eftirlíka umbønini ella krevur eitt hóskandi gjald, vera vísur í, at tú kanst skjalprógva, at ein umbøn frá skrásetta er greitt ógrundað ella órímilig.

Ert tú ein almennur myndugleiki, skalt tú eisini vera varur við vegleiðingarskylduna í fyrisitingarlógini, serliga um tú metir, at ein umbøn er órímilig. Tú eigur í slíkum støðum at tosa við skrásetta fyri at avmarka umbønina, so at umbønin ikki longur er órímilig.

Afturat hesum skalt tú vera varur við, at tú bert kanst nokta at eftirlíka ella krevja eitt hóskandi gjald í mun til greitt ógrundaðar ella órímiligar umbønir frá skrásetta. Undantakið er sostatt ikki galdandi fyri kunningarskylduna í §§ 23 og 24, sum tú skalt uppfylla av tínum eintingum og ikki eftir umbøn frá skrásetta.

## 2.6. At vera vísur í samleikanum hjá skrásetta (§ 22, stk. 2, 2. pkt.)

Tá tú sum dátuábyrgdari fært eina áheitan frá skrásetta, ið vil brúka síni rættindi, t.d. vil hava innlit í persónupplýsingar, skalt tú tryggja tær, at tann skrásetti er tann, sum viðkomandi sigur seg vera.

Tú skalt tryggja tær, at tú ikki gevur óviðkomandi innlit í upplýsingar um onnur, og tryggja tær, at tú ikki strikar upplýsingar ella líknandi, um annar enn skrásetti umbiður hetta.

At tryggja tær, at skrásetti er tann, sum viðkomandi sigur seg vera, kann t.d. fara fram við, at tú krevur at fáa víst samleikaprógv, sum t.d. koyrikort ella pass. Tær nýtist ikki at krevja slíkt, um tú á annan hátt hevur tryggjað tær, at tann skrásetti er tann, sum viðkomandi sigur seg vera.

Um skrásetti er umboðaður av øðrum, skalt tú eisini tryggja tær, at viðkomandi umboð hevur fingið fulltrú til at handla vegna tann skrásetta. Er umboðið advokatur, revisor ella annars fer fram sum eitt vanligt umboð innan fyri viðkomandi økið, vil tað vanliga ikki vera neyðugt at krevja skjalprógv fyri fulltrú.

Er skrásetti umboðaður av einum øðrum, kanst tú uppfylla tína kunningarskyldu yvirfyri umboðnum.

## 2.7. Hjálp tínum stovni ella fyritøku og tínum starvsfólkum við at gera mannagongdir, skabelónir o.a.

Fyri at tryggja, at tín stovnur ella fyritøka fylgja reglunum um rættindi hjá skrásetta, er tað eitt gott hugskot at gera greiðar mannagongdir fyri, hvussu tit gera, tá tit móttaka eina umbøn frá skrásetta.

Tað kann t.d. vera, at tit hava eina mannagongd, sum sigur, at tað er ávís deild ella ávíst starvsfólk, sum svarar øllum umbønum, tí henda deild ella starvsfólk hevur røttu

førleikarnar. Um tit skipa arbeiðið á hendan hátt, er týdningarmikið, at øll eru kunnað um mannagongdina, so tey vita, hvar umbønir frá skrásettum skulu sendast.

Tað kann eisini vera ein stór hjálp fyri tíni starvsfólk, um tú ger skabelónir, sum starvsfólkini kunnu brúka. Fyri ein stovn ella fyritøku, sum viðger nógv einstáttaði mál, er tað t.d. gjørligt at tillaga ein standard-tekst, ið lýkur kunningarskylduna í sambandi við viðgerðina av persónupplýsingum. Sí í hesum sambandi viðkomandi skabelónir á heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lógligt.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið